# Umhvørvið selur bilar

**Bilar dálka av hundunum til. Tí var reint umhvørvið, minni orkunýtsla og bio-bilar stóru høvuðsevnið á stóru bilasølustevnuni í Geneve í ár**



*Toyota hevði góðar royndir við hybridbilinum Prius, sum bæði hevur elektriskan motor og ein vanligan brennimotor. Nú koma fleiri hybridbilar, til dømis hesin Honda FCX Clarity, sum millum annað koyrir við brennikyknum (brint).*

Seinastu árini hava umhvørvisalit fingið alt størri týdning fyri bilaframleiðarar kring allan heim. Hetta rákið varð endaliga staðfest á árligu bilaframsýningini í Geneve í mars, sum er ein hin mest týðandi sýnisgluggunum hjá heimsins bilaframleiðarum.

Sum altíð á slíkum messum, var høllin pinnpakkað við skínandi kromi og lakki, pyntað við eiggiligum damum. Men kortini var messan í Geneve í ár øðrvísi enn vanligt. Tí nú eru tað umhvørvisgrundgevingar sum skulu gera søluarbeiðið fyri sølufólkini. Antin tað snýr seg um vanligir motorar við lægri orkunýtslu, at innmaturin í bilinum er úr bio-plasti, ella dekkini hava lægri rullimótstøðu, so er tað umhvørvið, sum selur bilar í dag.

Allir framleiðarar leita eftir svarið uppá, hvørja orkukeldu vit skulu brúka í framtíðini. Tí lovaðu fleiri framleiðarar í Geneve at bilar teirra framyvir fara at nýta bio-orku. Millum annað vístu teir prototypur uppá bilar, sum verða riknir við framtíðar drívmegi, so sum hydrogen. Men reint hydrogen letur bíða eftir sær, til ein skipan er ment, sum framleiðir hydrogenið við orku, sum kann endurnýggjast, til dømis við sólarorku. Tá verður hydrogen ein gullrein drívmegi, skrivar forskning.no.

**Rd.**

## Fylgisveinamyndir avdúka CO2 útlát



**Slóðbrótandi fylgisveinamyndir avdúka útlátið av manngjørdum CO2 útláti**

**Fyri fyrstu fer nakrantíð ber til við nýggjum fylgisveinamyndum at eygleiða nøgdirnar av manngjørdum CO2 útláti ymsa staðni á klótuni. Myndirnar, sum eru frá tíðarskeiðinum mai 2005 til apríl 2006, vórðu tiknar av evropeiska fylgisveininum Envisat, som varð sendur í ringrás 1. mars 2002. Myndirnar hava eina upployvsn á heilar 300 metrar, sum er tíggju ferðir klárari enn onnur líknandi kort hava verið frammanundan.**

**Fyrimunurin við fylgisveinamyndum er, at tær verða tiknar yvir longri tíðarskeið, og verða tí ikki ávirkaðar av ljós og myrkri, veðri og árstíð.**

**Millum annað ber longu nú til at síggja eitt kort yvir Evropa, har útlátið av CO2 er mest í økinum frá Amsterdam til Frankfurt, sum eisini er mest fjølbygda økið í Evropa, sigur norska heimasíðan www.forskning.no.**

**Øll kortini verða liðug í juli 2008, og tá fer at bera til hjá einum og hvørjum at taka tær niður av internetinum.**

**Nakrar av myndunum eru longu at finna á: http://dup.esrin.esa.int/projects/isummaryp68.asp**

**Rd.**

# Fer at ko



**Verða Føroyar ikki partur av Kyoto, kemur útflutningsvinnan at svíða. Hetta sigur Jákup Pauli Joensen, stjóri í Umhvørvisstovuni. Í Føroyum verður lítið og einki gjørt fyri at minka um útlátið, meðan londini í ES gera alsamt fleiri bindandi avtalur**

VEÐURLAG
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Mynd: Álvur Haraldssen*

Bæði Frankaríki og Týskland hava gjørt vart við, at tey lond, sum ikki eru partur av umhvørvisbindingunum í Kyoto, kunnu ikki fáa somu handilssømdir sum hini. Orsøkin til at hesar handilsforðingar ikki longu eru settar í verk, er at USA ikki hevur staðfest Kyoto sáttmálan. Men tað kann skjótt broytast, tá ein nýggjur amerikanskur forseti situr í Hvíta Húsinum, tá nýggjur sáttmáli skal undirskrivast í Keypmannahavn komandi ár.

- Í Føroyum hava vit bara roynt at lata sum einki og vóna, at hetta gekk yvir. Men jú longur vit eru uttanfyri, jú tyngri verður tað at byrja. Og hetta gongur ikki yvir.

- Heldur føroyska dølskni fram koma vit at svíða bæði samfelgsliga og vinnuliga, tí vit verða útihýst úr tí góða selskabinum, staðfestir stjórin í Umhvørvisstovuni.

Í 2005 bant ES seg til at minka útlátið við fimm prosentum, og til nýggju avtaluna í Keypmannahavn komandi ár verður tosað um, at ES skal binda seg til at minka útlátið við 20-30 prosentum, greiðir Jákup Pauli Joensen, stjóri í Umhvørvisstovuni frá.

Føroyska útlátið av veðurlagsgassum hækkaði við 11 prosentum frá 1990 til 2003. Og 1990 er útrokningarstøðið. Tað vil siga, at um Føroyar skulu minka útlátið við átta prosentum, er talan í veruleikanum um minst 20 prosent.